**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 31. mai 2022
J. nr.: 22/09783
Viðgjørt: AE

**Svar til fyrispurning nr. 52-190/2021 frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um ábøtur í Sumbiartunnilin**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar ætlanir eru um at gera ábøtur í Sumbiartunlinum, og nær ?
2. Nær kann roknast við at t.d. ljósviðurskifti, radiosamband, nógva støvið í tunlinum o.a. kemur í rættlag?
3. Er tað nøktandi, at ongin ventilatión er í tunlinum?
4. Lýkur tunnilin øll trygdar- og brunakrøv, og er tilbúgvingin nøktandi?

**Svar til fyrispurning**
Sumbiarbergholið fylgir teimum trygdarstandardum, sum vóru galdandi, tá ið tunnilin varð gjørdur. Tunnilin fylgir ikki standardum, ið eru galdandi, um tunnilin hevði verið gjørdur í dag. Tað er ein spurningur um játtan at dagføra eldri tunlar til dagsins standardir.

Landsverk gjørdi eina ætlan í 2017 um at dagføra Sumbiartunnilin til sama støði, sum til dømis Viðareiðistunnilin. Tað merkir, at hann hevði fingið ljós og nakað av grundleggjandi trygdarútbúnaði.

Ætlanin var, at arbeiðið skuldi gerast í 6 byggistigum:

1. Teknikhús uttanfyri tunnilin og høvuðstalvur til elskipanina (gjørt í 2017)
2. Neyðljós í loftinum, ið er umleið 1/3 av samlaðu ljósunum (gjørt í 2018)
3. Neyðskáp, eldsløkkjarar og telefonir í tunlinum
4. Mátarar og kameraskipan í tunlinum
5. Restin av loft ljósskipanini í tunlinum
6. Neyðljós á vegginum og endalig uppsetan av skipanini

Arbeitt varð í 2017 og 2018 við einari loysn, har tvey av teimum fyrstu stigunum vórðu gjørd fyri umleið 3,5 mió. kr. Tá var nakað av tí grundleggjandi arbeiðnum gjørt við eitt nú at leggja dragirør til káplar í tunlinum, men neyðljósini í tunlinum vóru eisini við tá, so tí er nakað av ljósi í tunlinum. Hetta svarar til umleið ein triðing av samlaðu ljósinum, tá ið øll armaturini eru sett upp.

Í ætlanini frá 2017 eru radio og ventilatión ikki við. Radio verður mett til at kosta 1 mió. kr., og ventilatión 7 mió. kr.

Landsverk roknar við, at tað fer at kosta einar 10 - 11 mió. kr. afturat, um byggistig 3 – 6 skulu gerast. Um radio og ventilatión harumframt skulu leggjast inn í tunnilin, so verður kostnaðurin umleið 18 – 19 mió kr.

Vanliga mælir Landsverk til, at ventilatión er í tunnlunum. Tað veitir eina betri trygd, um eldur kemur í tunnilin. Ventilatión er tó ein rættiliga stór íløga.

Samstundis sum vegakervið er útbygt, ferðslan er vaksin, størri dygdarkrøv og trygdarkrøv verða sett til vegir, tunlar og brýr, er játtanin til viðlíkahald og til at umvæla og tryggja landsvegakervið tó ikki hækkað í nógv ár.

Vónandi ber til at fáa undirtøku fyri at hækka játtanina til dagføring og viðlíkahald næstu árini.

Tinganes, 31. mai 2022

**Uni Rasmussen**
landsstýrismaður